RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

betri

# Læraravegleiðing

## 4.-6. flokkur

# Endurskinskanning inni

Tit kunnu gera kanningina inni í eini myrkari gong ella fimleikarhøll

---

**Endamálið er:**
At geva børnunum eina ítøkiliga uppliving av týdninginum, tað hevur, at brúka endurskin.

### Útgerð

- Lummalyktir
- Endurskin. Tað kunnu vera endurskin út ymsum skapi, ymisk sløg, nýggj og slitin endurskin og endurskinsvestar
- Annað tilfar so sum aluminiumsfoliu, tilfar sum er gjørt úr stáli, spegl, tilfar úr klæði og annað, sum næmingarnir halda vera áhugavert at royna.

### Framferð

- Veljið tveir royndarpersónar og festið endurskin á annan teirra. Hin skal vera í myrkum klæðum.
- Børnini savnast við ein vegg, og royndarpersónarnir fara so langt burtur, sum til ber.
- Lýsið við lummalykt móti persónunum og latið teir ganga móti tykkum saman. Á henda hátt sæst, hvønn mun endurskinini gera.
- Endurtakið við øðrum endurskinum og kannið, um eitt nú skap og slit ávirka, hvussu sjónlig endurskinini eru.
- Latið ein persón í ljósum klæðum vera royndarpersón at kanna, um hetta ger mun.
- Roynið annað tilfar so sum aluminiumsfoliu, tilfar úr stáli, spegl ella annað tilfar, sum nevnt omanfyri og kanna, um tað gevur afturskin.